# B36 knívin á barkanum

**Um teir í árstalsfelagnum skulu hugsa um at fáa grannarnar aftur, so hava teir ikki ráð at missa nakað sum helst**

KÍ-B36

*Jóannes Hansen*



*Í heimadystinum móti KÍ tveitti B36 trygga 2-0 leiðslu fyri borð. Ráð eru ikki til endurtøku av hesum hesaferð*

Lagið hevur ikki verið nakað serligt í Klaksvík seinnapartin av vikuni. Teir eru vónbrotnir av, at tað í evstu løtu kiksaði, soleiðis at tað í staðin fyri trý stig bara fekst eitt burtur úr á Toftum, og at sjeyndi javnleikurin harvið gjørdist veruleiki.

Í morgin stendur enn ein stór uppgáva og avbjóðing fyri framman hjá KÍ, sum higartil í ár bara hevur vunnið ein av fimm heimadystum (tá verður undirhaldið ímóti FCK og Esbjerg sjálvandi ikki roknað uppí!). Einasti sigurin var í fyrsta umfarinum ímóti B68.

KÍ hevur sama fólkið tókt, sum var við í mjørkanum týskvøldið. Neyvan verður talan um tær stóru broytingarnar, men tað kann kanska hugsast, at Arnhold Joensen, sum ikki hevur verið á liðnum leingi, og sum varð skiftur inn á Toftum, fer at fáa kjansin millum teir fyrstu ellivu.

### Mugu fáa fult

Hjá B36 er einki sum eitur, um teir skulu hugsa um at fáa fatur í HB, sum er fimm stig frammanfyri teir. HB tykist so mikið væl upplagt, at tað í løtuni er torført at ímynda sær, at teir skulu tapa. Tí er neyðugt hjá B36 at vinna hvørja ferð, um teir skulu hanga uppií.

Hjá B36 er manningin umleið tann sama, sum hon var á Mølini. Ronnie Samuelsen, sum var burturstaddur týskvøldið, verður við aftur. Arnbjørn Danielsen er framvegis skaddur í lærkrikanum, Bárður Mortansson er vøddaskaddur og Jens Erik Rasmussen hevur trupulleikar við fótliðnum.

Nú eru fýra ár síðani, at KÍ fekk fult á heimavølli ímóti B36. Í fjør vann B36 2-1, í fyrraárið vunnu teir 3-2, og í 2001 vunnu teir 2-1. Í 2000 vann KÍ 2-1 á heimavølli ímóti B36. Tá ið liðini hittust í Gundadali fyrr í summar, var B36 á odda 2-0, og alt bendi á tryggan heimasigur. So kom KÍ fyri seg, teir javnaðu, og í síðstu løtu var um reppið, at teir fingu sigursmálið.

# Jens Martin aftur á rókini

**Í gjár varð ikki roknað við, at útlendsku spælararnir, sum hava vant við ÍF, fara at vera við mánakvøldið**

NSÍ-ÍF

*Jóannes Hansen*

Hjá NSÍ venjaranum er tað neyvan torført at seta sínar menn upp til 11. leikumfarið. Heimadysturin verður ikki fyrrenn mánakvøldið. Tá fáa teir í Runavík vitjan av ÍF. Fuglfirðingar hava bara vunnið eina ferð í landskappingini í ár. Tað gjørdu teir í heimadystinum ímóti NSÍ.

Tveir fremmandir menn hava verið í Fuglafirði í vikuni og vant. Í gjár varð ikki roknað við, at teir fara at spæla við ÍF mánakvøldið. Formellu loyvini vóru ikki komin upp á pláss, og annar teirra var skaddur undir venjing.

Hjá ÍF er Rúni Elttør leikbannaður, eftir at hann tiltuskaði sær reytt kort aftaná, at dómarin sunnudagin hevði bríkslað fyri síðstu ferð.

Hjá NSÍ, sum ikki hevur vunnið, síðani teir spældu seinnu hálvfinaluna í Fuglafirði, verður Jens Martin Knudsen aftur í málinum. Mikukvøldið var hann leikbannaður, tí hann hevði sæð reytt í finaluni á Ólavsøku. Vit fingu tað ikki heilt staðfest í gjár, men tað varð roknað við, at miðvallarin Kári Hansen var leikbannaður eftir gula kortið, sum hann fekk í Vági.

Tá ið NSÍ og ÍF í 1999 hittust í Runavík, var úrslitið málleysur javnleikur og í 1998 var úrslitið 1-1. Í 1997 vann ÍF 4-2. Síðst NSÍ vann á ÍF á heimavølli var í 1994, tá úrslitið var 3-1.

### Støðan, 1. deild menn

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 10 | 7 | - | 2 | - | 1 | 26 | 10 | 16 | 23 |
| 2 B36 | 10 | 5 | - | 3 | - | 2 | 21 | 12 | 9 | 18 |
| 3 Skála | 10 | 5 | - | 2 | - | 3 | 21 | 14 | 7 | 17 |
| 4 VB | 10 | 4 | - | 4 | - | 2 | 16 | 11 | 5 | 16 |
| 5 NSÍ | 10 | 4 | - | 3 | - | 3 | 15 | 14 | 1 | 15 |
| 6 EB/Streymur | 10 | 4 | - | 2 | - | 4 | 17 | 15 | 2 | 14 |
| 7 GÍ | 10 | 4 | - | 2 | - | 4 | 15 | 20 | -5 | 14 |
| 8 KÍ | 10 | 2 | - | 7 | - | 1 | 16 | 12 | 4 | 13 |
| 9 ÍF | 10 | 1 | - | 1 | - | 8 | 14 | 34 | -20 | 4 |
| 10 B68 | 10 | 0 | - | 2 | - | 8 | 7 | 26 | -19 | 2 |



*Jens Martin Knudsen er nú aftur tøkur hjá runavíkingunum*



# Martin føroyameistari í tennis

**Finalan í kappingini um føroyameistaraheitið í tennis fyri einstaklingar hjá monnum varð leikt í Havn hósdagin. Martin N. Simonsen vann trygt á Jón Brekku**

TENNIS

*Terji Nielsen*

*terji@sosialurin.fo*

Ein av teimum ítróttargreinum, sum ikki so nógv er at hoyra um í fjølmiðlunum her heima, er tennis. Hendan ítróttargrein hevur ikki serliga nógvar fjeppparar, og tað er óivað høvuðsorsøkin til, at so lítið er at hoyra um tennis her á landi.



*Martin Simonsen gjørdist hósdagin enn einaferð føroyskur meistari í tennis*

*Mynd: Maria Olsen*

### Stórur munur

Í finaluni um føroyameistaraheitið hjá monnum, sum bleiv leikt á tennisøkinum í Gundadali hósdagin, hittust tveir teir størstu profilarnir innan tennis í Føroyum seinnu mongu árini, nevnliga teir báðir Martin Nolsøe Simonsen og Jón Brekku.

Finalan gjørdist ongantíð serliga spennandi, tí til tað var Martin væl betur fyri enn Jón, og útisetin vann ein tryggan sigur upp á 6-2 og 6-0.

Um dystin sigur Jón Brekku, at munurin millum seg og Martin var stórur, og hann heldur, at munurin bara er vaksin seinastu tíðina. – Hann venur niðri í Danmark, meðan eg sjálvur geri ógvuliga lítið við tað, og tað merkir sjálvsagt, at hann er blivin sterkari, og at eg eri blivin verri, sigur Jón Brekku. Fyri einum fimm árum síðani var tað annars Jón, sum hevði munin á Martini, men ein álvarsligur skaði í hondini gjørdist so mikið umfatandi fyri Jón, at hann ongantíð av álvara er komin fyri seg eftir tann skaðan.

Kvinnurnar kappaðust eisini um føroyameistaraheitið fyri einstaklingar, men í mun til menninar, sum voru oman fyri 20 í tali, vóru tað einans tríggjar kvinnur, ið kappaðust, og teirra kapping bleiv tí avgreidd við einum bólkaspæli. Tað vil siga, at allar spældu móti øllum, og tá ið samanumkom var Sára Arge ein tryggur vinnari.

### Ikki við á næstu oyggjaleikunum

Føroyingar hava fleiri ferðir verið umboðaðir í tenniskappingini á oyggjaleikunum, tó uttan at tað hevur eydnast at fingið nakað heiðursmerki í hesari ítróttargrein. Komandi summar, tá ið oyggjaleikir verða, er tó eingin tenniskapping, og tað er sjálvsagt ikki mennandi fyri áhugan fyri tennis, at so er, heldur Jón Brekku. Hann leggur tó afturat, at tennisfólkini av Gibraltar hava í kvittanum at skipa fyri einari uttanveltaðari oyggjaleika-tenniskapping, men enn hava føroyingarnir ikki tikið støðu til, um teir fara at taka lut í hesari kapping.

Um áhugan fyri tennis í Føroyum sigur Jón Brekku, at hann er ikki so galin. Tað er komið nakað av børnum til í seinastuni, og tað er bara at frøðast um, sigur hann. Hinvegin eru umstøðurnar til at spæla tennis ikki av teimum bestu, tí so fáir vøllir eru, og eisini er tað sera trupult at sleppa inn í hallirnar at spæla, sigur hann at enda.

# Sigfríður yvirtekur 2. deild hjá B36

**Nú er greitt, at fyrrverandi venjarin hjá ÍF, Sigfríður Clementsen, tekur við ábyrgdini av næstbesta liðnum hjá B36**

VENJARASKIFTI

*Terji Nielsen*

*terji@sosialurin.fo*



*Sigfríður Clementsen skal nú royna at venda gongdini hjá aðrudeildarliðnum hjá B36*

Tað hevur ikki gingist serliga væl hjá 2. deildarliðnum hjá B36. Liðið liggur og berjist fyri at sleppa undan niðurflyting til 3. deild, og tað er ikki nøktandi hjá árstalsfelagnum í Havn. Í einari roynd at venda gongdini hevur leiðslan í B36 tískil valt at skifta nú fyrrverandi venjaran, Sjúrð Norðbúð, út við Sigfríð Clementsen, sum fyrr í ár var koyrdur frá sum venjari hjá ÍF í bestu deildini. Sigfríður hevur áður við hepni havt leiðsluna av næstbesta liðnum hjá B36.

### Stóran týdning fyri besta liðið

Formaðurin í B36, Kristjan á Neystabø, sigur, at tað er sera umráðandi fyri B36 at hava eitt lið í næstbestu deildini. Hann sigur, at serliga í ár hevur 2. deildarliðið havt stóran týdning, tí at besta liðið hevur verið so hart rakt av skaðum, at neyðugt hevur verið fleiri ferðir at fara niður á næstbesta liðið at fáa fatur á spælarum til at manna besta liðið.

Kristjan á Neystabø sigur, at leiðslan í B36 er av teirri uppfatan, at felagið skal hava eitt lið í næstbestu deildini, so at teir spælarar, sum standa á gáttini til besta liðið, eru so væl fyri sum gjørligt. Formaðurin í árstalsfelagnum vísir tó á, at tað er vorðið alsamt truplari hjá feløgunum, sum eru umboðaði í bestu deildini, eisini at hava lið í næstbestu deildini.

– Hesi seinnu árini er 2. deild nærmast ruddað fyri b-lið, um vit kunnu kalla tey tað. Bæði GÍ, B68, HB og onnur við hava verið úti fyri niðurflyting úr 2. deild til 3. deild seinnu árini, og í løtuni eru tað bara B36, KÍ og VB, ið eru umboðaði í báðum teimum fremstu deildunum, sigur Kristjan á Neystabø og leggur afturat, at júst hesi trý feløg liggja eisini og berjast í botninum av 2. deild. – Kappingin í 2. deild er blivin nógv sterkari seinnu árini, og tað felagið, sum umframt eitt lið í bestu deildin eisini hevur eitt gott lið í 2. deild, er sera væl fyri, sigur formaðurin í B36. – Vit vilja tískil gera alt fyri at hava eitt gott 2. deildarlið, men tað hevur ikki gingið eftir vild higartil í ár, og í eini roynd at venda hesi gongd hava vit sett Sigfríð Clementsen at taka við venjarasessinum eftir Sjúrð Norðbúð, sigur B36-formaðurin at enda.

Kappsúkkling:

## 30 km einkultstartur

FM í 30 km einkultstartkappsúkkling verður leygardagin hin 14.08.2004 í Havn. Tað er Tórshavnar súkklufelag sum skipar fyri kappingini.

Start og mál er á vegnum frammanfyri plantusøluna í Hoyvík. Súkklast skal til Kaldbaks, har vent verður og síðani aftur til málið í Havn.

Hvønn minutt verður ein kappsúkklari sendur avstað, til allir eru farnir. Tíð verður tikin í Kaldbak og aftur á málinum. Tann sum súkklar teinin skjótast verður føroyameistari.

Kappingin er fyri vakin og unglingar.

Øll eru vælkomin at verða við, treytin er at góður súkkluhjálmur verður brúktur og at súkklan er í rímiligum standi.

Ofta taka ítróttarfólk, sum vanliga ikki súkkla kapp, lut í hesi kappingini. Til dømis eru róðrarfólkini sera væl fyri nú róðrarárið júst er liðugt, tey eru meira enn vælkomin at royna seg.